# Tak meg sum eg eri




**Soleiðis eitur nýggj fløga, sum Andras Danielsen og Jonfinn Árnafjall hava givið út. Á fløguni eru 13 sangir, sum Jónfinn hevur gjørt orð og lag til, og sum teir báðir í felag hava lagt til rættis og spælt allan tónleikin til**

**FLØGUÚTGÁVA**
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað koma nógvar fløgur út nú um dagarnar, og »Tak meg sum eg eri« er ein teirra. Tað eru teir báðir Andras Danielsen og Jonfinn Árnafjall, sum geva hesa fløguna út.

Jonfinn hevur gjørt orð og lag til teir 13 sangirnar á fløguni, og hann hevur eisini gjørt myndina til húsan, ið sipar til tey, sum tora at lætta veingirnar og royna nakað nýtt, og tey, sum standa eftir og ivast.

Tekstirnir eru ein blandingur av skemti og álvara, sum tað so beinrakið stendur skrivað yvir pallinum i gomlu dansi- og biohølunum í Sjónleikarhúsinum.

Tveir gestasangarar eru við á fløguni. Tað eru tey bæði, 13-ára gamla Bjørg Petersen, sum syngur sangin »Í urtagarðinum«, og Herfinn Árnafjall, sum syngur sangin »Show me a way to go home«. Herfinn er annars undir útbúgving sum operasangari.

Andras og Jonfinn hava spælt til dans í nógv ár. Andras er kendur frá bólkinum »Tónlist«, sum spældi í sjeyti- og áttatiárunum.

Jonfinn spældi við tónleikabólkinum »Flúrar« upp gjøgnum nítiárini og fram til 2004, tá hann saman við Andrasi stovnaði dansibólkin »Get Back«, og nú bólkin »Andras og Jonfinn«.

Fløgan er framleidd hjá Actura Digital ApS í Århus. Upptøkur og ljóðblanding er gjørd í Studio 10 í Tórshavn.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði, seinnapartin minni vindur av útnyrðingi. Sólglottar, men eisini okkurt kavaælið. Hitin millum 0 og +3 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, um kvøldið upp í stívt andøvsgul av eystri. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitalagið millum ÷1 og +2 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið millum ÷2 og +1 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin andøvsgul av norði ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin beint omanfyri frostmarkið. Týsdagin hvassur vindur av landsynningi og regn, seinni nakað minni vindur av útsynningi og ælingur. Hitin millum 4 og 7 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -10 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | -- |
| Ammassalik | -4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 12 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 3 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 6 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | -8 |
| Berlin | 7 |
| Warzawa | 7 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 6 |
| Paris | 10 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 16 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 4 |
| New Dehli | 21 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | -3 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 7 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 27 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 962 hPa. vestan fyri Lofoten stendur í stað. Eitt annað lágtrýst, 981 hPa. vestan fyri Skotland fer eystureftir.




**Í dag:**
Lágtrýstið við Stavanger fer eystureftir og vestan fyri lágtrýstið rekur køld luft eitt skifti móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 02/12 kl. 06[00] – 03/12. 06[00]. Hitin í gjár: 2°
Minsti hiti máldur í desember: -7,2° - Mesti hiti máldur í desember: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 04/12 kl. 06[00] – 05/12. 06[00]
Avfallið higartil í desember: 43 mm

## Tiltøk í Miðlahúsinum

**5. desember kl. 19.00**
*Evert Taube kvøld við Petur Eliasen og Niels Midjord*

**12. desember**
*Trapputing - Pedagogfelagið*

**15. desember**
*Musikskúlin*

**17. desember**
*Trapputing/Bitting um flogvøll*

FØROYABANKI
*stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum*

Lesið Sosialin

## VESTFALLSKYRRINDI

1. des. Seinna kvarter
3. des. Mánin longst frá jørðini
9. des. Tendring

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | Suðuroyar-/Vágafirði sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | Hestfirði/Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. Des | 03.58 | 16.18 | 02.58 | 15.18 | 03.13 | 15.33 | 05.58 | 18.18 | 06.58 | 19.18 | 02.13 | 14.33 | 01.13 | 13.33 | 04.13 | 16.33 | 05.13 | 17.33 | 03.43 | 16.03 | 04.58 | 17.18 |
| 7. Des | 04.38 | 16.58 | 03.38 | 15.58 | 03.53 | 16.13 | 06.38 | 18.58 | 07.38 | 19.58 | 02.53 | 15.13 | 01.53 | 14.13 | 04.53 | 17.13 | 05.53 | 18.13 | 04.23 | 16.43 | 05.38 | 17.58 |
| 8. Des | 05.19 | 17.41 | 04.19 | 16.41 | 04.34 | 16.56 | 07.19 | 19.41 | 08.19 | 20.41 | 03.34 | 15.56 | 02.34 | 14.56 | 05.34 | 17.56 | 06.34 | 18.56 | 05.04 | 17.26 | 06.19 | 18.41 |
| 9. Des | 06.04 | 18.27 | 05.04 | 17.27 | 05.19 | 17.42 | 08.04 | 20.27 | 09.04 | 21.27 | 04.19 | 16.42 | 03.19 | 15.42 | 06.19 | 18.42 | 07.19 | 19.42 | 05.49 | 18.12 | 07.04 | 19.27 |
| 10. Des | 06.51 | 19.16 | 05.51 | 18.16 | 06.06 | 18.31 | 08.51 | 21.16 | 09.51 | 22.16 | 05.06 | 17.31 | 04.06 | 16.31 | 07.06 | 19.31 | 08.06 | 20.31 | 06.36 | 19.01 | 07.51 | 20.16 |